## DAGSINS MEINING

# Breið semja um órætt

Tann, sum lurtaði eftir orðskiftinum á tingið um uppskotið til kringvarpslóg, kann ikki annað enn undrast á ta breiðu semu, ið har tóktist vera millum teir stóru flokkarnar á tingi. Semja er um tær grundleggjandi broytingarnar, eitt nú at eitt stýri skal setast fyri kringvarpið. Endamálið við hesum stýrið sigst vera at skilja stovnin frá politiska myndugleikanum, soleiðis at hann er púra óheftur av politiskum valdi. Hetta er leisturin í okkara grannalondum, og er tað sostatt upplagt at vit nýta somu skipan her hjá okkum. Alt gott um tað.

Tað er komið mangt áhugavert undan kavi í sambandi við uppskotið til kringvarpslóg. Eitt nú gongur fram av skjølunum, ið er løgd út á netið undir tingmálinum, at kappingarráðið hevur ger vart við, at lógaruppskotið er kappingaravlagandi. Almenni stovnurin, sum fær loyvi at krevja gjald frá borgarunum, fer framvgis at sleppa at kappast við privatu miðlarnar um lýsingarinntøkurnar. Tað framgongur eisini av viðmerkingum Kappingarráðsins, at hetta er ikki vanligt í okkara grannalondum. Kappingarráðið mælir til, at privatu miðlarnir á ein ella annan hátt fáa kompensatión fyri hetta, at ein almennur stovnur við lóg fær ein megastóran kappingarfyrimun fram um privatar miðlar. Eitt hugskot er at lata teir privatu fáa lut í inntøkunum hjá almenna fjølmiðlinum. Hetta hugskot hevur ongan tjans og er eisini ivasamt av mongum orsøkum. Hinvegin tykist hugskotið hjá ráðnum um at avmarka lýsingarmøguleikar Kringarpvarpsins á netinum at hava ein møguleika og ein týdning, sum ikki skal undirmetast.

Tað er heilt vanligt í okkara grannalondum, at eitt nú bløðini fáa fíggjarligan studning úr statskassanum. Orsakirnar til henda stuðul eru fleiri t. d., at kappingin er skeiv, at bløð hava mentanarligan týdning, at útjaðarin skal kunna fáa bløðini o.s.fr. Vit unna okkara kappingarneyta í Sortudýki alt gott og vit skulu verða tey fyrstu til at viðurkenna tann ómetaliga stóra týdning, ið Kringvarpið hevur fyri upplýsing, mentan og almenna debatt. Hinvegin kann tað ikki í longdini góðtakast, at eitt demokratiskt land hevur lógfesta kappingaravlagandi skipan innan fjølmiðlaumhvørvið. Hetta kann jú í versta føri enda við einum almennum monopoli, og tað er vist ikki ætlanin hjá hesari samgonguni ella tí nýggju »fjølmiðlasamgongu«, sum kom í Verðina á Løgtingi í gjár. Orðaskiftið, sum flestøll fjølmiðalfólk hava fylgt við stórum áhuga, sýndi okkum eina breiða semju um at varðveita ein lógfestan órætt. Vit loyva okkum at mæla Føroya Løgtingi til at hugsa álvarsliga um spurningin um, hvussu føroyska fjølmiðlamyndin skal síggja út um nøkur ár og harvið um kappingartreytirnar á fjølmiðlamarknaðinum. At enda skulu vit bert gera vart við, at uppskotið til nýggja kringarpslóg annars er eitt frálíkt uppskot, sum vit vóna verður samtykt.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Søla av festijørð »Kirkjubøhagi fyri Handan«

**Óli Jákup Müller,**
fyrrv. bóndi

Fyri nøkrum árum síðani, meðan undirritaði sat við festinum omanfyri Argir - Kirkjubø Hagi fyri Handan - bleiv at kalla allur undirhagin tikin frá festinum - móti festarans vilja. At byrja við fór sølan fram á tann hátt, at festarin fekk eitt bræv frá Jarðarráðnum, har biðið varð um játtan frá festaranum til søluna. Tá bóndin skuldi royna at liva av tí, sum jørðin gav, var svarið hvørja ferð noktandi, sjálvandi.

Tað, sum so hendi hvørja ferð, var, at eitt bræv kom nakað aftaná, sum boðaði frá, at Jarðarráðið hevði selt umtalaða lendið til umsøkjaran fyri lítið og lætt í mun til uttanfyri liggjandi lendi, sum fyrr varð keypt frá sama festi - eisini fyri lítið og lætt, og síðani, um selt, so fyri heilt aðrar upphæddir. Tá festarin dugdi at síggja, at um ikki so langa tíð bleiv einki eftir at vera bóndi á, mátti hann royna at skipa so fyri, at henda sundurpettanin av festinum helt uppat. Hann bað stjóran á Jarðarráðnum um at bera so í bandi, at festið varð útlagt til landbúnaðarjørð bururav. Tað var óneyðugt, segði stjórin, av tí at tað longu var útlagt til landbúnað, hvat tað so vil siga eftir teirra metan. Festið er alla tíðina minkað eftir sama leisti, uttan at nú verður festarin nóg illa tikin við - ella varskógvaður um - at ætla søla skal fara fram. Er hann heppin, fær hann okkurt at vita gjøgnum fjølmiðlarnar ella sum slatur.

Nú er verandi festin gjørdur varður við, at viðtikið er at selja eitt feldugt øki av festinum uppi á Hamrinum á Argjum, 100.000 fermetrar, og at arbeitt hevur verið við hesum málinum síðani 2004, uttan at taka festaran við upp á ráð. Okkurt hevur staðið í bløðunum um ætlanir har uppi, men so leingi sum festarin ikki er kunnaður um málið frá røttu myndugleikunum, ber ikki til at taka hetta í álvara. Havnar Kommuna fekk í síni tíð ein heila hagapart, Flatnarhaga, til byggilendi og hvat annars tørvur var á. Hetta skuldi so kunna nøktað tørvin hjá Havnar Kommunu í nógv harrans ár framyvir. Men hóast tað breiða teir býin út yvir lendi, sum teir einki eiga í - við vælsignilsi frá Jarðarráðnum, nú Búnaðarstovuni - og annars øllum, sum hava eitt at hava sagt í slíkum málum, uttan bóndanum sjálvandi. Hann spælir jú ikki við.

Tað er sjálvandi ikki annað at vænta, tá fólk, sum als ikki duga at síggja ár framyvir, hvat tey gera við náttúruna. Býráð mugu ikki veljast politiskt. Tann liturin er nemmur at skifta, sum leikur fer. Einki ráð er betur enn tey fólk, sum til eina og hvørja tíð mann hesi ráð.

Í Føroyum er so lítið av landbúnaðarjørð, at ansa vit ikki eftir, gongur ikki long tíð, til alt landbúnaðarlendi er farið undir heilt. Og tá vendist ikki aftur.

Tað skal og má gerast reglur fyri, hvat skal leggjast út til landbúnað, lógfestast og syrgjast so fyri, at tann jørðin, sum kann nýtast til landbúnað, fær frið til tað í alla framtíð.

Tann útstykking, sum nú er ætlanin at gera uppi á Hamrinum á Argjum, er ikki fyri at hjálpa fólki at fáa nakað at búgva í, men eina og aleina fyri vinnings skuld hjá byggiharranum. At tað so er søtur musikkur í oyrunum á politikkarunum, er so ein onnur søk. Teir skulu jú veljast aftur til næsta val, og hava ábyrgd fyri tí oyðilegging, sum teir geva loyvi til.

Tað mesta av lendinum í Føroyum er ikki egnað til landbúnað, so tað skuldi ikki verið nøkur forðing fyri at bygt har. Og Havnar Kommuna hevur, sum áður nevnt, fingið ein stóran part av lendi at ráða yvir.

Tað er nemt og stuttligt at býta jørð út til høgru og vinstru. Serliga tá ein ikki sjálvur eigur tað, ein býtur úr. Vit eiga ikki jørðina. Hana eiga okkara eftirkomarar til eina og hvørja tíð, og vit, sum í dag umsita jørðina, fáa einki rós fyri tað, vit hava gjørt, tá øll landbúnaðarjørð er farin undir heilt. Bøndur eru tað ikki fyri tann stóra vinnings skuld. Tann, sum hevur skilf á føroyskum landbúnaði, veit, at tað er eitt ótrúligt slit við longum og strævnum arbeiðsdøgum, ongari frítíð, 365 døgum um árið. Tað ræður um at fáa brúkið til at mala runt. Lítið meira enn tað blívur tað til, sjálvt við strev og hegni.

# 160 føroyingar á legu í Jyllandi

**12. árið á rað skipaði samkoman í Malta í Hirtshals fyri páskalegu, sum hesa ferð var á Als odde**

**LEGA Í HIRTSHALS**

160 føroyingar hava á páskum verið á legu á Himmerlandsgården á Als odde uttan fyri Hadsund. Fólkið savnaðist á legustaðnum mikukvøldið, og páskakvøld var legan liðug.

Tað var samkoman í Malta í Hirtshals, sum bjóðaði til leguna. Leguluttakararnir komu úr fleiri plássum í Danmark. Eitt nú úr Hirtshals, Esbjerg og Sønderborg. Harafturat vóru fleiri, sum áður hava verið útisetar og sum nú búgva í Føroyum, millum leguluttakararnar.

Zacharias Zachariassen var komin úr Føroyum fyri at undirvísa. Skipað varð eisini fyri tiltøkum fyri børn og ung. Millum tey, sum tóku sær av teimum ungu, var David Lukama, sum er ættaður úr Afrika og føroyskt giftur.

Hetta var 12. árið, at skipað varð fyri sovornari legu. Seinastu fimm árini hevur legan verið á Als odde.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.